LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluviðri 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluviðri, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

Akfør

TOYOTA COROLLA
árg. 89, koyrt 278.000 km, koyrir væl. Til sølu fyri 6.000 kr.
Tlf. 258330

SUZUKI INTERCOOLER VS 750
árg. 1990, í sera góðum standi til sølu um høskandi boð fæst.
Tlf. 214144

BÍLIGA TIL SØLU
Peugeot 306, árg. 96 og koyrt 92.000 km, 15" alufelgur, vetrardekk fylgja eisini við. Sær sera væl út.
Tlf. 332303/221221

VOLVO 740 TI
182 HK, árg. 88, 190.000 km, nýsýnaður, leður/velour innan, koksgráur, nýggj dekk, til sølu fyri 15.000 kr.
Tlf. 212101

TIL SØLU
Volvo 240 stationcar. Árg. 1986. Nógvir nýggir eykalutir ísettir.
Tlf. 210919

BMW TIL SØLU
BMW 324 2.4 TD, V6 við motorskaða til sølu til hægstbjóðandi. Spildur nýggjar sportfelgur v/ dekkum kunnu fylgja við, sera bíliga.
Tlf. 581515

BILUR VIÐ SKAÐA
Saab 9-5 við skaða árg. 98 bíliga til sølu vegna flyting.
Tlf. 580474

SUZUKI SVIFT 1.3
Árg. 90 til sølu fyri 1.600 kr.
Tlf. 218778

TIL SØLU
4 vetrardekk v/ felgum 75/65 R til Ford Escort til sølu.
Tlf. 259250

BÍLIGA TIL SØLU
Golf II 5 h árg. 1987, í góðum standi, sýnaður 4.04. Pikadekk eru við. Bíliga til sølu.
Tlf. 215728

BILUR TIL SØLU
Ein svartur Volvo 240 í sera góðum standi til sølu, um høskandi boð fæst. Nýsýnaður, árgangur 88. Koyrt 210.000 km
Tlf. 584444

TIL SØLU
Pikadekk á felgum til sølu. Stødd, 165R/14. Felgurnar hava 4 hol Prísurin er 1600,00 Kr
Tlf. 214142 ella 421037

CITROEN BX 1:6
Árg 86 til sølu fyri 5.000 kr. Sýnaður uttan brek, koyrir fínt, góð summardekk umframt góð vetrardekk, nógvir eykalutir.
Tlf 222761

BMW 325 I
E30, 170 HK. Alufelgur, spoylarar, gáttir, leðursetur, KN-filtur og tuningsútstoyt til sølu fyri 30.000 kr.
Tlf. 210595

TIL SØLU
Ein VW Passat 1,9 TDI - 5 trin autogear, árgang 1998. Koyrt 223.000 km til sølu. Prísuppskot: 98.000 krónur
455954 ella 223862

MAZDA 626 1,8
Árg. 89 km. 220.000 til sølu fyri 12.000 kr.
Tlf. 457746

TIL SØLU
Ein Golf 1.8 GTI, uttan plátur, men krevur fáar ábøtur, til sølu fyri 5.000 kr. Eyka motorur fylgir við.
Tlf. 220323

EIN BLÁUR POSTBILUR
vøruvognur. Diesel, frá 1992 til sølu. Onkur smá brek. Prísur 20.000.
Tlf. 220106

MITSUBISHI PAJERO 2.5 TD
Stytra modellið, til sølu. Sýnaður nov. 2003. Árg. 1988.
Tlf. 506086

TIL SØLU
Volvo 340 GL í góðum standi. Sýnaður 04, sær gott út innan og uttan. Tvær ferðir rustviðgjørdur. 7.000 kr.
Tlf. 503095 ella 263452

VW PASSAT 1.9 TDI
St. silvurgráur, árg. 1998, koyrt 128.500 km. Sportfelgur + eyka sett. Nýsýnaður, ikki roykjarabílur.
Tlf. 218398

TIL SØLU
Scania 112 við krana og skiftilast, 1 last til Scania 143 E og 1 Scania 112 við skiftilast, kranakonsol aftan.
Tlf. 225590

FORD SIERRA 2.0 I CLX
Stationcar, árg. 91, v/ sportfelgum, til sølu. Ring
Tlf. 503790

SUM NÝGGJUR
Toyota RAV 4 persónbilur, árg. nov. 02. Km. 32.000. Krók, sportfelgur og CD-spælara. Avbera vælhildin, til sølu um høskandi boð fæst.
Tlf. 211034

VOLVO 460
Volvo 460 til sølu sum eykalutir.
Tlf. 267026 eftir kl 15

VW PASSAT 1.9 TDT 110 HK
Árg. 08/97, km. 230.000, silvurgráur, til sølu. Ring
Tlf. 218388

TIL SØLU
VW Corrado G60 til sølu um høskandi boð fæst.
Tlf. 221123

HYUNDAI ELANTRA 1.5 GLI
Árg. 92. Nýsýnaður við radio/cd-spælara/box. 20.000 kr.
Tlf. 224910

AUDI 80 BENSIN
1.8 E, árg. 1986, til sølu sum eykalutir. Nýggj dynamo og bensinpumpa.
Tlf. 213804

OPEL ASTRA 2.0 DI
Gráblaur við metallakk, 12 ára rustgaranti, 82 HK diesel, cd-spælara, 15'' sportfelgur á nýggjum dekkum, árg. 99, sýnaður 09/04, 95.000 km.
Tlf. 511243

TIL SØLU
Hyundai Accent 1.3, árg. 97, 53.000 km. í góðum standi, bíliga til sølu.
Tlf. 212087

SKODA OCTAVIA
stationcar, diesel, árg. okt. 99, koyrt 91.000 km, gráur, nýsýnaður. Hevur airc., el-rútar aftan og framman, powerstýring, metallak o.a. Er økonomiskur, 700 kr tá tangin er fullur (uml. 230 kr.) Ein »ikki-roykjarabilur«. Sera stórt viðførisrúm og kraftiga maskinu. Stendur á góðum heilársdekkum, gott radio/cd fylgir við. Hesin bilurin er verdur at royna. Prísuppskot 120.000 kr.
Tlf. 215353 Regin

FIAT TIPO 1.6.IE
Árg. 03/92. sýnaður 03/2004. Í góðum standi og sær væl út.
Tlf. 313094 ella 513094

TIL SØLU
BMW 316i, 1.9 L. Árg. 1999/04. Koyrt 97.000 km. Prísuppskot: 160.000 kr.
Tlf. 455434 ella +4533143418

HEVUR NAKAR EIN
Toyota Hiace motor 2.4 Diesel, model 1993–1996, typa L20, at selja mær? So eru tit vælkomin til at ringja til mín á
Tlf. 257140, Atli

BRUGTE RESERVEDELE
til Fiesta. Forlygter samt blinklygter og højre baglykte haves. Venstre justerbar sidespegl. Generator + starter. Henvendelse efter kl. 17
Tlf. 322049 ela 522049

STARTARI
Er tað nakar, sum eigur ein startara til ein Toyota Corolla DX 1.6 frá 87? Ring so endiliga
Tlf. 250308

FORD FIESTA 1.3I
Árg. 12 í 95. Ongin rustur og er dektyladur. Er væl viðfarin og hevur bara koyrt 60.000 km. Selist um høskandi boð fæst.
Tlf. 220425

TOYOTA CARINA II XLI
Til sølu fyri 8.000 kr. Árg. 1991. Sýnaður apr. 2004. Ring
Tlf 210365

4 PÍKADEKK Á FELGUM
Stødd: 185/65R-14. Passa til m.a. Mazda 323. Óslitin. Til sølu fyri 3000 kr.
Tlf. 447765/217765

TOYOTA CARINA II XLi, 5H.
Árg. 90, sýn. 09.03, motorur 90.000 km. Pikadekk á felgum og summardekk fylgja við. Í góðum standi. Til sølu fyri kr. 20.000.
Tlf. 445036 ella 269617

TOYOTA MOTORUR 2.0
3S-FE, bensin, ynskist til keyps.
Tlf. 221176

4 FELGUR
13'' til Ford Escort bíliga til sølu.
Tlf. 443077

MOTORUR
Til ein Opel Astra 1700 t.d. Árg. 97 ynskist till keyps.
Tlf. 504654

SVARTUR BMW 320 I
Við skaða framman til sølu. Árg 85. Eykalutir fylgja við.
Tlf. 256944 eftir kl 17

BMW 535 TIL SØLU
Árg. 88. Hevur næstan alla útgerð. Fer fyri 50.000 kr.
Tlf. 218796

TIL SØLU
17'' felgur til BMW við 225/45-17 summardekkum til sølu fyri 9.500 kr. Hava koyrt færri enn 1.000 km. Nýprísur 14.000 kr.
Tlf. 260739 ella 229006

SLEIPIKRÓKUR
v/ tilhoyri. til Ford Escort sedan frá 1996 til sølu.
Tlf. 721698

Amboð

VIÐFESTIVOGNAR
Tredal vognar, við spiralfjaðrum til sølu. Kunnu siggjast á heimasíðu www.tredal.no. Ein er á goymslu.
Tlf. 218101, Todal, Velbastað

BANDSAG TIL SØLU
Brúkt bandsag til sølu fyri 2.000 kr.
Tlf. 220338

MINIGRAVIMASKINA
Minigravimaskina til leigu.
Tlf. 422215 ella 217215

Arbeiði

VASKIHJÁLP
v.m. ynskist, ring og fá nærri at vita.
Tlf. 441100 ella 741100

MVG-BÓKHALD
Tørvar tær hjálp við MVG-uppgerðini ella bókhaldinum, so eri eg til reiðar at gera tað.
Tlf. 265573

ALT MÁLARAARBEIÐI
verður gjort. Ring og fá tilboð.
Tlf. 250387

ANNARLEIÐIS SMÁKØKUR
ella lagkøkur til føðingardagin, veitsluna, móttøkuna ella okkurt heilt annað? Eg baki bingokúlusmákøkur/lagkøkur, marskeku, ymiskar marengsbotnar og mangt annað. Eg baki – tú heintar. Ring millum kl. 14–18
Tlf. 273592 í Havn

MASKINGREVSTUR
Alt jarð- og betongarbeiði verður gjørt s.s. avgrevstur, planering, dyrking, brekkaraarbeiði, stoyping og mangt annað. Tilboð verða eisini latin.
Tlf. 222241

FLÍSAR Á TÚNI
Vit átaka okkum at leggja flísar, stoypa garðar, smærri grótlaðingar, maskinvelting, umframt alt annað urtagarðsarbeiði.
Fa. Urtagarðsrøkt tlf. 327131 ella 283953

UNG PIGE SØGES
Vi er en dansk familie på 5, der søger en sød pige til hjælp med pasning af vores børn. Vi hjælper gerne med din rejse til Danmark. Ring eller send os en e-mail. Glæder os til at høre fra dig . e-mail: pernille@sundbogård.dk
Tlf. +45 63560008

EG ÁTAKI MÆR
Reingerðing privat. Vinarliga ring
Tlf. 318401 ellas 271901

ARBEIÐI YNSKIST
Dugnaligur 21 ára gamal maður við koyrikorti, ABCD DE CE DE tørvar koyriarbeiði. Jú støddi akfar, jú betur. Alt hevur áhuga. Ring til
Tlf. 503593 Danny

Barnaansing

BARNGÓÐ GENTA/KVINNA
søkist at ansa einum 2 ára gomlum drongi frá kl. 17 til 23 aðruhvørja viku heima hjá okkum. Ring og hoyr nærri.
Tlf. 310716 ella 210716

Barnaútgerð

VÆLHILDIN
tvíburakombivognur til sølu fyri 2.000,-
Tlf. 448535/270635

EMALJUNGA
tvíburavognur til sølu fyri kr. 1.200,- Regnslag og standibretti fylgir við.
Tlf. 310649

KOYRISTÓLUR VIÐ GALESJU
Eitt lambsskinn, innkeypsnet, parasol, regnslag, seli. Selist alt samlað fyri 600 kr.
Tlf. 322850

BILSTÓLUR TIL SØLU
Av merkinum Brevi 0-13 kg. fyri 800 kr. Er góðkendur og sera væl hildin. Ring
Tlf. 310036 ella 264541

TIL SØLU
Barnavognur (Skemman) bíliga til sølu.
Tlf. 223167

BÍLIGA TIL SØLU
Rimasong 122x64, barnasong 140x70 v/madrassum. Simo barnavognur, bláur
Tlf. 321177 ella 229342

TIL SØLU
Myrkabláur Odder barnavognur
Tlf. 456832 ella 223570

BARNAVOGNUR
Hvítur barnavognur av merkinum Odder til sølu fyri 800 kr.
Tlf. 219878

TIL SØLU
Ein grulvigarður, har botnurin kann setast upp í hædd, er til sølu fyri 450 kr.
Tlf. 333673 eftir kl. 18

TIL SØLU
Ein tvíburðavognur av merkinum Odder er til sølu. Vognurin er koksgráur og hjólini og stelli eru svort. Við í søluni eru tveir Brio trygdarselar, flugunet og skilaveggur. Prísur 5.000 kr.
Tlf. 333673 eftir kl. 18

Bátaútgerð

28 FÓT GLASTREVJABÁTUR
til sølu um høskandi boð fæst. Báturin hevur fiskiloyvi, er fult riggaður til línuveiðu, og hevur alla nútimans útgerð. At kalla nýggj útgerð kann eisini fylgja við.
Tel. 447946 ella +4521259895

BÁTATELEFON
Philips 450 NMT til sølu
Tlf. 272253

GARNASPÆL
Oljutrýst garnaspæl við hydr. pumpu. Krevur ábøtur, til sølu fyri 600 kr.
Tlf. 819359

UMSTÝRING
við aksli og skrúvugreiðum. West mekan typa 25-30 mv3. Krevur ábøtur til sølu fyri 600 kr.
Tlf. 319359

SEKSÆRINGUR 28 FÓT
v/ radara, ekkoloddi, VHF, stereoanleggi, spæli og seks hálvautomatiskum snellum, bíliga til sølu.
Tlf. 441247

TIL SØLU
Páhangsmotorur 25 HK bert 1/2 ára til sølu.
Tlf. 223167

HUMMARALOYVI
Ynskist til keyps. Ringi til
Tlf. 312238

LÍNA TIL SØLU
Uml. 30 stampar av línu til sølu.
Tlf. 313216

SERVOGEAR
Typa 60c við skrúvugreiðum til sølu
Tlf. 216146 ella 282246

BÁTAMOTORUR
200 HK Catepillar V8, TypaA 3208 til sølu.
Tlf. 216146

GÁGGUKNÚSARI
nýggjur, við skiljara úr rustfríum stáli (220V), til sølu.
Tlf. 216146 ella 282246

TIL SØLU
Nýggj bátakumpass 120 mm útv.
Tlf. 741964

HJÓL TIL BÁTAVOGN
4 stk. 200x50 mm, 20 mm hol. 5 - 250x65 hol 25 mm
Tlf. 741964

Bingo

GOTT BINGO
verður í TB-húsinum tórskvøldið 14. oktober kl. 19. Eyka eykaspæl verður.
Tvøroyrar Bóltfelag

GOTT BINGO
verður í Róðrarneystinum á Argjum hósdagin 14. okt. kl. 19. Full pláta gávukort 400,- tó 6.-12. spæl 600,- Gávukort á lutaseðli m.a. før. krov til heystar, gávukort á 500,- og 1.000,- Drigið verður millum spølini. Eykaspæl, koyring heim, øll eru hjartaliga vælkomin.
Argja Róðrarfelag

SUÐUROYINGAR
Gott bingo verður í Skúlahøllini í Trongisvági mánakvøldið 18 okt. kl. 19.00. Annað hvort bingo er lamb og annað hvørt er gávukort á kr. 400,00. Annars nógv gott á lutaseðli, m.a. føroysk gás til jóla Eyka - eyka spæl verður eisini.
Tvøroyrar Svimjifelag

GOTT BINGO
verður í kappróðrarneystinum í Streymnesi týskvøldið 12. oktober. Øll eru vælkomin
H.S.R.

BINGO
Verður í Mettustovu mánakvøldið 11. okt. kl. 19.
Kvinnufelagið

FRÁ SPASTIKARAFELAGNUM
Gott bingo verður í Pálsstovu mánakvøldið 11/10 kl 19. At vinna full pláta 400 kr. Á lutaseðli m.a. 2 gávukort á 500 kr og tvey á 1000 kr. Drigið verður millum spølini, eyka spæl, koyring heim. Øll er hjartaliga vælkomin.
Spastikarafelagið

FRÁ EYDNUNI
Gott bingo verður sunnudagin 10. okt. kl. 16.00. Høvuðsvinningur: gávukort frá Smyril Line á 2.000 kr. Eykaspælið 1.600 kr. Drigið verður millum spølini.
Eydnan

HEIMABINGO
Hesi hava vunnið í heimabingo hjá 7. flokkunum í Vágs skúla.
Nr. 1. 374257. Nr 2. 373099.
Nr. 3 374023. Nr. 4 373428.
Nr. 5 373367. Nr. 6. 373473
Nr. 8. 373250. Nr. 9 373154.
Takk fyri stuðulin.
7. flokkarnir í Vágs skúla

EYDNUHJÓL VERÐUR Í STØKKHØLLINI
Í Saltangará 31. okt. 2004. Tey, ið vilja stuðla við at lata lutir til eydnuhjólið kunnu ringja til Poulu, tlf. 447073, Amy, tlf. 447718 ella Miu, tlf. 447242. Takk fyri stuðulin.
Eldrafelagið Nón í Saltangará

GOTT BINGO
verður í Glæmuni í Kvívík mánakvøldið 18. oktober kl 19. 12 plátur 100 kr. Høvuðsvinningur á lutaseðli gávukort á 1.000 kr. Drigið verður millum spølini. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Glæman

Burturm. /funnið

GÁS VIÐ FRÆLSI
í Norðradali farin av haga. Bøgan gráblá, steggin grábøkutur við lítlum toppi. Parið fór í hagan við 10 ungum, alt er beinskert á vinstra vongi, og hevur lítið skarð í uttaru fit á vinstra fóti. Vinarliga ring
Tlf. 312016 ella 268824

Býli

ÍBÚÐ YNSKIST
sum skjótast í Tórshavn ella nærheindis.
Tlf. 258821

HÚS Í KVÍVÍK TIL LEIGU
Fult møbilerað hús í Kvívík til leigu frá 1. novembur og fyribils fram til 1. mai 2005. Húsini er stór 270 fermetrar og alt er innrættað.
Tlf . 421402 aftaná kl. 18.00

2 KØMUR TIL LEIGU
kr. 1.500,- fyri hvørt í vesturbýnum, atgongd til køk, bað og vaskimaskinu, 1 mór. depositum.
Tlf. 314757 eftir kl. 17

SUMMARHÚS VIÐ GJÓGV
til leigu. Allir vanligir hentleikar eru í húsinum, møguleiki er eisini at leiga húsini í stytri tíðarskeið.
Tlf. 421305 ella 210305

HJÁLP!!!
Ungt par leitar eftir íbúð ella lítlum húsum í Runavíkar økinum. Kunnu tit hjálpa okkum so ringi á
Tlf. 218043 ella 257707 eftir kl. 18

BUTIKSLOKALE
ønskes til leje í Vág. Er der nogle der har et lokale til leje í Vág. Med evt. forkøbsret min. leje 3-4 ár. Der skal være toilet og evt. lille køkken eller mulighed for det. Så kontakt os straks og vi kan aftale nærmere.
Ivan og Anita Poulsen, tlf. 373118, Vág

UNGT PAR
við einum barni ynskja íbúð í Tórshavn skjótast gjørligt. e-mail: bhe@post.olivant.fo
Tlf. 224385/253382

ÍBÚÐ YNSKIST!
Mamma við tveimum børnum ynskir íbúð við 2 kømurum í Havn skjótast gjørligt. Max 4.500 kr. við ljós og hita. Fara væl um og gjalda rættstundis.
Tlf. 223339, Kristina

RØDOVRE
Íbúð í Rødovre til leigu. Kann leigast sum íbúð ella sum kømur. Íbúðin er í sethúsum.
Tlf. +45 22937353

TIL LEIGU
2 kømur til leigu í Vesturbýnum við atgongd til køk, bað og vaksimaskinu, nær við Læraraskúlan.
Tlf. 221158 ella 313799

HÚS TIL LEIGU Í MIÐBÝNUM
Stór hús til leigu í miðbýnum í Havn. Kostnaður er 7.500 kr. um mán. 3 mán. depositum krevst. Áhugað kunnu ringja
Tlf. +45033930330 MJ

ÍBÚÐ TIL LEIGU
undir Gráasteini í Tórshavn, 1500 kr. um mór. plus el og hita.
Tlf. 271503, Rene

PAR SØKIR ÍBÚÐ
Fitt og friðarligt par søkir íbúð í Havn. Hava fast arbeiði, gjalda til tíðina, fara vel um og roykja ikki. Max 4.000 kr. um mór. Vinarliga ring
tlf. 220819

ÍBÚÐ YNSKIST
23 ára gomul genta søkir íbúð í Tórshavn. Eri friðarlig, fari væl um og gjaldi sjálvandi rættstundis. Ring
Tlf. 222457

ÍBÚÐ TIL LEIGU
Ovara hædd á húsum nær miðbýnum til leigu frá 1. jan 2005. Íbúðin er 2 stovur, 3 kømur, køkur og baðirúm. Stødd uml. 92 fermetrar. Leiga 5.500 kr. um mán. uttan ljós og hita. Skriva til Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn
Bill. mrk. 1934 j

HÚS Í KLAKSVÍK TIL SØLU
Um høskandi boð fæst eru húsini hjá okkum Undir Klakki 39 til sølu.
Tlf. 457069

SUMMARHÚS
Dupult, bjálvað húsbingja til sølu. Hevur íbinding til el, vatn og sanitet. Køkur við køliskápi, wc/brúsa og kamar/uppihaldsrúm.
Tlf. 458811 og 273355

UNGT PAR, 22 OG 27 ÁR
søkir íbúð í Havn. hava eingi børn, eru friðarlig, fara væl um og gjalda til tíðina. Vinarliga ring
Tlf. 218007 ella 271057

KAMAR YNSKIST Í HØVUÐSSTAÐARØKINUM
Av ungari kvinnu við føstum starvi.
Tlf. 273932

ÍBÚÐ SØKIST
Tvær gentur í 20'unum søkja íbúð í Tórshavn. Vit fara væl um, hava fast arbeiði og gjalda til tíðina. Max. 4.500 kr. Vinarligar ringi
Tlf. 581119 ella 254166

HÚS TIL SØLU
Í Sumba.
Tlf. 370025

HÚS Í LEIRVÍK TIL SØLU
Byggiár 2001. Betonghús, ið eru kledd við timbri. Búareal 150 fermetrar. Kjallari + garaga. Prísuppskot 1.000 000 kr. Áhugað kunnu ringja á
Tlf. 443384 ella 743384

JÓALFERIA Í REYKJAVÍK
Frá 23. des. til 3. jan. 2005. Er íbúð til leigu miðskeiðis í Reykjavík. Nærri at vita
Tlf. +354 5621737 ella +345 8641736

GÓÐU TIT, SUM HAVA
eina íbúð við 2 verilsum, latið meg fáa hana. Eg eri 19 ár, gangi í 2. G og eri úr Skopun.
Tlf. 361581 ella 561581

HÚS YNSKJAST TIL LEIGU
Á Streymoynni ella á Oyrarbakka, skjótast gjørligt.
Tlf. 321265 ella 211266

ÍBÚÐ NÆRHENDIS
Oyrasundskollegiinum í Keypmannahavn til leigu frá 2/10–15/10. Ring
Tlf. 264086 ella 26272958

ÍBÚÐ YNSKIST
Einlig mamma fyrst í 30'unum við einum barni søkir íbúð ella hús til leigu í Tórshavn/Argjum/Hoyvík. Eg hvørki royki ella drekki. Eg fari væl um. Eg havi fast starv og gjaldi til tíðina. Vinarliga ring
Tlf. 262179

HÚS Á TVØROYRI
Eru til leigu vikuskifti og stytri tíð. Vanligir hentleikar eru.
Tlf. 222684

ELDRI HÚS Á GLYVRUM
Til leigu við innbúgvi.
Tlf. 281583

HØLI TIL LEIGU
Í miðbýnum. Uml. 200 fermetrar.
Tlf. 315438

Dansur

VEITSLA FYRI STØK
Aldur: umleið 40 ár og eldri. Nær: 30. oktober kl. 19.30.. Hvar: Í Pálsstovu, Mykinesgøta 7, Tórshavn.. At tekna seg: Flyta kr. 350,- í Suðuroyar Sparikassa k. nr. 407.410.7. Kvittanin er atgongunerki. Skal viðmerkjast: Navn, búðstaður og telefonnummar. Seinasta freist: hósdagin 21. oktober. Tey fyrstu 150 eru tryggjað pláss.. Nakað at spyrja um, so ring til:
Dagbjørg tlf. 582400 Ólavur tlf. 220589, eftir kl

Dýr

HEY
Vit eru 5 hundahvølpar sum mangla eitt heim, vit eru 6 vikur gamlir. Vinarliga ring
tlf. 507138 ella 448475

HUNDAHVØLPAR
Verðins fittastu hundahvølpar verða latnir um ca. 3 vikur. Eru heilt ljósir. Mamman er miðal stødd.
tlf. 316312

TIL SØLU
2 mán gamal tarvskálvur til sølu.
Tlf. 218101, Velbastaður

HAMSTRARABÚR
(heilt nýtt). Alt fylgir við. Grønt/lilla búr, stórt hjól omaná, koyrir runt. Býli og snaraður skreiðibani. Kann útbyggjast.
Tlf. 213080

ER TAÐ NAKAR
ið eigur ein »dvørgvædder«-kanin unga at selja okkum?
Tlf. 333043 Maria og Arni

SCHÆFERHVALP, HAN, SØGES
søges. Vi er meget intr. i at købe en schæferhvalp. Vi er en glad familie på tre, som vil give den et godt hjem. Hvem har sådan en som skal sælges. Ring straks.
Tlf. 373118

FØROYSKUR HESTUR
Til sølu. Ring og hoyr nærri.
Tlf. 503566 ella 421310

TIL SØLU
2 persara kettlingar til sølu.
Tlf. 310476 - 506797 eftir kl. 16

FITTUR SPAKUR
gráur kettlingur, kann fáast við at avheinta hann. Einans til djóravin.
Tlf. 503433

TVEIR SERA FITTIR HVØLPAR
Tvær 2 mánaðar gamlar tíkir, undan bordercollie tík, til keyps. Um tú ert áhugað/ur ert tú vælkomin at ringja á
Tlf. 422696/250463 eftir kl 15.10

HJÁLP
Er tað nakar sum hevur eina kanin til sølu, vinarliga ring
Tlf. 220955

ER NAKAR SUM VIL EIGA
okkum. Silva, kettan hjá okkum hevur 2 kettlingar sum eru klárir at flyta heimanífrá. Ein er gráur einlittur (frensur) og ein er grá og hvít (ketta). Sera fittir og kerligir. Duga at eta, leppa og eru reinligir. Heilsan Friði og Bogi - ringið á
Tlf. 314546 ella 268120

HEY
Er tað nakar, ið hevur eina dvørgkanin til sølu.
Tlf. 220955

Fundir

PENSIONISTAFELAGIÐ Í HAVN
Hevur vanligan fund í Losjuni, Tinghúsvegur 18, mikukvøldið 13. oktober kl. 19.00.
Pensionistafelagið í Havn

AÐALFUNDUR Í EYDNUNI
Boðað verður til eykaaðalfund í Eydnuni á Oyrarbakka tann 23. okt. 2004 kl. 10.00. Skrá: Framtíðin hjá Ungmannafelagnum Eydnuni
Eydnan

Húsarhaldstól

KOMFÝRUR
Runt vask við rundum bakka, krana og borðplátu, verður selt samlað fyri 1.500 kr. Kann eisini seljast hvør sær.
Tlf. 319239

FRYSTISKÁP
Lítið frystiskáp til sølu fyri 300 kr.
Tlf. 251235 eftir kl.15.30

TIL SØLU
Elektrónisk vaskimaskina LG. Nýprísur 7.000 kr. Nú 4.500 kr. Sum nýggj. Turkitrumla »Zanussi« 900 kr. Lítið koliskáp 800 kr. Ring
Tlf. 519704

KJØTHAKKIMASKINA
Og bandsag til kjøt ynskist til keyps.
Tlf. 210595

TIL SØLU
Vaskimaskina bíliga til sølu
Tlf. 456832 og 223570

TIL SØLU
Matstovu/grillútbúnaður. T.d. 36 stólar, 9 borð, 2 komfýrar, (gamal el-pálleggsknívur) fritura, steintoy og m.a. Ring og fá meira at vita á
Tlf. 375459 ella 215459

KØLISKÁP VIÐ LÍTLUM FRYSTARA
Gorenje - New Line - tvær stjørnur
Tlf. 741964

VESTFROST FRYSTIBOKS
Lágorku 73x60 til sølu fyri 2.000 kr.
Tlf. 441017

Innbúgv

STÓRT OG GOTT
ungdómsskrivaraborð til sølu fyri 800,-
Tlf. 508190

SKRIVARABORÐ
80 x 160 stórt, eitt ára gamalt, til sølu fyri 700 kr.
Tlf. 214100

TIL SØLU
Song 90x200 við góðari madrassu til sølu. Prísur 300,00 kr
Tlf. 214142 ella 421034

TIL SØLU
Sjónvarpsborð frá Ide Húsinum til sølu. Ljóst træ. Prísur 300 Kr
Tlf. 214142 ella 421037

TIL AVHEINTINGAR
2 klædnskáp 60x60x200 fáast við at avheinta tey.
Tlf. 319777 ella 519777

SOFABORÐ
2 ára gamalt sofaborð við undirhill og glasplátu í miðjuni. Sum nýtt, nýprísur kr. 1200,- nú kr. 400,- (ella tosa vit um prísin)
Tlf. 251235 eftir kl.15.30

SOFA
Ein 2 ára gomul blá sofa, hóskandi til 3 pers. bíliga til sølu. Nýprísur kr. 1500,- nú bert 500,- (ella tosa vit um prísin)
Tlf. 251235 eftir kl.15.30

BYGGIREOL LAKERAÐ BÓK
2 m long, 3 sektiónir, til sølu fyri 1.500 kr.
Tlf. 447061

BOXMADRASSA
140x200 til sølu fyri 600 kr.
Tlf. 314203

TIL SØLU
Skenkur 178x45 og vitrineskáp 92x184 úr myrkum voksviðgjørdum træi selist við stórum avslátri. Eisini runt borð diam. 45 cm v/ einari plátu og 5 stólar. Ring
Tlf. 517528

SEKKJASTÓLUR YNSKIST
Sekkjastólur til vaksin ynskist.
Tlf. 210509 Katrin

TIL SØLU
3 pers. leðursofa + sofaborð 800 kr. Leðurstólur við krakki 1.500 kr.
Rlf. 519704

BRÚKTAR LEÐURSOFUR 2+3
til sølu fyri 5,000 kr. Sera væl viðfarnar. Futon sovisofa 140x200 til sølu fyri 2.000 kr.
Tlf. 268198

GAMALT VITRINE SKÁP
Frá »Frú S« til sølu.
Tlf. 250051

TIL SØLU
Tvær óútpakkaðar leðursofur, 3+2, brúnar til sølu.
457698 - 455155

TIL SØLU
Vælhildin sovisofa, stødd 200x115 cm, úttrekt. Góð góðska.
Tlf. 312968

LEÐURSOFA TIL SØLU
Svørt hornasofa. Mál: 278x210 cm. Vælhildin, til sølu fyri 4.500 kr.
Tlf. 213105 ella 333105

SPÍSIBORÐ
+ 4 stólar til sølu fyri 3.000 kr.
Tlf. 519220 ella 310009

LEÐURSOFA 3+2 PERSÓNAR
Kenwood stereoanlegg v/ radio, CD, bandsp. og Dali hátalarar til sølu.
Tlf. 215609

TIL SØLU
1 ára gomul Innovation Futon sovisofa til sølu vegna flyting. Ráhvít við stálarmleni, ryggleni kann innstillast, útsligin 140x220, eyka betrekk fylgir við. Keypt úr Ldé Møblum, nýprísur 4.800 kr, til sølu fyri 2.800 kr. Ring
Tlf. 220297

TIL SØLU
1 ára gamalt ljóst træsofaborð til sølu vegna flyting. Pent lakkerað sofaborð við skuffu undir, uml 130x70, nýprísur 2. 000 kr, fæst fyri 1.000 kr. Ring
Tlf. 220297

SOFABORÐ
til sølu.
Tlf. 250211

TIL SØLU
Sofa til 3 persónar og 2 lenistólar.
Tlf. 250211

TIL SØLU
Hvitt skrivaraborð 60x90 cm v/ 3 skuffum og hvít sovibriks v/ 2 skuffum undir biliga til sølu.
Tlf. 508889

COMET BRIKS
70x190 v/ botni, lítið brúkt, til sølu fyri 300 kr.
Tlf. 442122 eftir kl 17

Leikur

LEIKUR TIL SØLU
Posar við ymiskum leikum til sølu fyri 20,- kr. og 40,- kr.
tlf. 583388

Lutaseðlar

STUÐULSBRØV KÍF
Vinnarar av stuðulsbrøvunum hjá Kollafjarðar Ítróttarfelag:
Vinningur 1: Nr. 175,
Vinningur 2: Navn,
Vinningur 3 Nr. 454,
Vinningur 4 Nr. 355,
Vinningur 5 Nr. 452,
Vinningur 6 Nr. 444.
Allir vinnarar hava fingið boð. Kollafjarðar Ítróttarfelag takkar fyri stuðulin
KÍF

LUTASEÐLARNIR
Hjá Johanne eru drignir 05.10.04. Johanne TG 326 takkar hjartaliga øllum fyri stuðulin. Vinnandi seðlarnir eru:
Apex ferðaseðil frá Atlantic nr. 01818.
Apex ferðaseðil frá Atlantic nr. 02511.
Gávukort upp á 1000,- frá Shell nr. 02421.
Gávukort upp á kr. 1000,- frá Sirri nr 02679.
1/2 skinn av grind nr. 00131.
1/2 skinn av grind nr 01108.
Radio frá radioverkstaðinum hjá Sævar nr. 00547,
Gávukort á 500,- frá Toystovuni í Vági nr. 03187.
Vinnararnir kunnu seta seg í samband við
Kunningarstovuna í Vági, Mótttaka tlf. 374342 ella 284342

EYDNUHJÓL/LUTASEÐLAR
Hesir vinningar eru ikki heintaðir. 65839 B (gulur) 4993 (violet) 4776 (violet). Vinnararnir vera bidnir at ringja á tlf. 757575. Takk fyri stuðulin.
Bygdafelagið Báran

HESI HAVA VUNNIÐ
í heimabingo hjá Jómsvíkingum:
1. 220711. 2. 253116 3. 373576
4. 373711 5. 373576 6. 373409
7. 373420 8. 373442 9. 373057
10. 37050. Takk fyri stuðulin.
Jómsvíkingar

Matur

TIL SØLU
3 lambsær til sølu, at slakta.
Tlf. 218551

TIL SØLU
Avroð, krov og neytafjørðingar kunnu bílleggjast. Torfinn Dalsgarð, Velbastað.
Tlf. 218101, E-mail: todal@post.olivant.fo

LAMBSKROV
Nýflett og avroð til sølu.
Tlf. 421094

KROV ÚR OYNDAFIRÐI
Lambskrov og ærskrov til sølu. Ærskrov verða seld sera bíliga. Ring á
Tlf. 441839 ella 211839 Martin á Fløghamri

VIT FLETTA TÝSDAGIN
Nøkur krov eru til sølu. Prísur 60 kr. kg.
Tlf. 221168

Pløgg

**SKÓT